- Lívið á Landssjúkrahúsinum

Reportasjurøð

# á blink



*Við høvdalagið, Petur av Kák, portørur. Við fótalagið, Rani í Líð, portørur*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Petur iðrar seg eitt sindur um, at hann ikki setti elektrodur á mannin og tók hjartamynd. Hann skrivar ambulansujournalin lidnan, meðan Rani fer at gera sjúkrabilin kláran til næsta túr. Á veg út hoyra vit læknan spyrja sjúklingin, um hann er trongur. Og sandoyingurin svarar:

- Ja! Eg eri gorhungraður!

## Tað sker bara EINKI!

Petur og Rani flyta uttan íhald sjúklingar inn á Landssjúkrahúsið og millum deildirnar. Petur fegnast um, hvussu gevandi tað er at vera saman við einum hjartatroyttum abba, sum Jenis av Rana leggur inn, og Rani harmast um, at ein fitt, krabbasjúk langomma, ið teir koyra til kanningar, neyvan verður livandi leingi. Løtu seinni gleðist Rani hinvegin um, hvussu vælsignað tað er at síggja framgongdina hjá eini yngri, heilaskaddari konu, sum hann koyrir av fysioterapiini niðan á E3. Og Patch Adams stendur neyvan Peturi av Kák kurl, tá ið portørurin fær tríggjar sjúkar vágamenn á somu stovu at renna saman í ein sannan skreyteld av skellilátri.

Meðan Petur og Rani alsamt føða sjúkrahúsið við rávøru, sæst ein stuttbeintur nólsoyingur við treystligum gongulagi fara í allar ættir innandura. Maðurin er um fimmti ára aldur. Hann eitur Niels Danielsen og er eisini portørur. Høvuðsskyldurnar hjá Nielsi eru at heinta rusk, skitið toy og brúktar sengur í dagtímunum.

Fyrsta leiðin hjá Nielsi um morgunin er til E3, sum er uppvenjingardeild til sjúklingar, ið hava hava verið raktir av heilabløðing ella hava sklerosu. Ruskið er í svørtum plastikkposum, og toyið er í hvítum toyposum. Alt er savnað í skolirúmunum. Niels tveitir toyposarnar á ein parkeraðan vogn í tunlinum. Seinni koma kviku katakombikkini at avheinta vognin við trukki og sleipa tunga toyfjallið allan vegin undir jørð niðan í vaskaríið.

Ruskið fer út í kjallaratúnið eystanfyri. Okkurt lamskotið flogvit hevur fingið tað andleysa innskot, at ruskbingjan ikki kann standa aðrastaðni enn beint við inngongdina til kapellið. Bingjan er ikki feld niður í túnið; hon stendur bara har sum eitt falliskt listaverk og blómar í fullari hædd. Og hon lekur eisini eins og ein onnur Oljshana. Fleiri ferðir um dagin noyðist lágvaksni nólsoyingurin av almakt at tveita rokaðar ruskposar eina slaka manshædd upp í loft, fyri at fáa ruskið inn um bingjukantin.

- Her er eisini nógv gamalt blóð, sigur Niels um medisinska ruskið frá rannsóknarstovuni. Hetta ruskið fer í eina serliga bingju, sum stendur uppaftur tættari inngongdini til Kapellið enn áður nevnda, bláa ruskbingja; hon, ið ein lýggjan dag loypur bæði í eygu og nasar.

Niels fer síðan í skolirúmini á seingjardeildini til skurðsjúklingar, medisinsku dagdeildini, skurðgongini, rannsóknarstovuni og intensivu deild, áðrenn hann sum tað seinasta tømir ruskrúmið í kioskini.

Arbeiðsskyldurnar við innbygdum óskynsemi dugir hann uttanat. Ikki minst hevur Niels vant seg við at bíða eftir, at ein lyfta skal verða tøk. Í sambandi við drepandi bíðitíðina hevur onkur speisom sál klistrað eina parkeringsskivu á vognin hjá honum.

- Man ger vart við hetta og hitt, men tað sker bara EINKI, suffar Niels, sum hevur starvast her í 28 ár.

Umsíðir eydnast tað at leggja hald á eina lyftu við lyklinum, ið Niels hevur krógvað aftan fyri Kapel-skeltið í kjallaranum. Meðan lyftan togar okkum heilt upp á átta, roynir Niels at týna tøgnina. Hann klappar fyri seg sjálvan, ger prumpiljóð við hondunum og mutlar miðleyst:

- Bumm, bumm, bumm!

Niels steðgar við hvørja deild frá átta og niðureftir. Hann kagar út um lyftukarmin at vita, um starvsfólkini hava hildið fyriskipanina og sett brúktu sengurnar við lyftuna. Sengurnar verða handaðar Salvør Reynagarð og Marthu Johannesen í kjallaranum. Tær kunnu vaska seytjan skitnar sengur í senn, hóast madrassurnar mangan eru mettaðar við mannatrekki, spýggjuløgum og slintrum av storknaðum sveita.

Í sambandi við sengurnar liggur Niels í einum endaleysum stríði um territorium. Alneyðugt er at hava smáar seingjagoymslur allastaðni, so at honum ikki nýtist niður til Salvør og Marthu eftir reinum sengrum hvørjaferð. Enn sleppur hann at hava fýra á goymslu uttan fyri rannsóknarstovuna, men tað verður valla leingi, skilst.

Klokkan 9 taka vit ein innlagdan mann út úr móttøkuni. Hann er lagdur niður í song og skal upp á átta.

- Nú, tygum eru útssaligur í morgun, sigur Niels við mannin.

- Ja, svarar tann gamli. Eg skuldi fara at svimja í morgun, men so fór alt at sigla fyri mær.

- Góðan morgun, tit! Her er ein maður til tykkara!

- Fínt, Niels! Koyr hann bara innar á stovu eitt!

- Ókey, sigur Niels og gevur sjúkrasystrunum eitt lítið nevs